Ludvig og Maria Poulsen:

# Fyrsti handil við ísinkram

**Hesa ferð fara vit at umrøða Mariu og Ludvig Poulsen. Ludvig var og Maria Poulsen er kent handilsnavn í Havn. Men hvørji vóru tey bæði?**




ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo




*LUDVIG POULSEN*
*F. 20-3-1865*
*D. 9-12-1938*

*MARIA POULSEN*
*F. JACOBSEN*
*F. 4-10-1874*
*D. 20-8-1951*

*BURTUR ÚR LIKAMINUM HEIMA HJÁ HARRANUM*



*Ludvig og Maria Poulsen í urtagarðinum*

Maria var dóttir Jacob Jacobsen, bøkjara f. 1836, sum var av Húsum í Havn. Tískil var hon systir til kendar menn sum M.A. Jacobsen, sum mentunarlønin eitur eftir og Hjalmar Jacobsen, sum enn er ein kendur bókhandlari. Hendan ættin verður umrødd seinni í samband við pápa hennara.

Maria giftist í 1896 við Ludvig Poulsen, sum var einkjumaður. Tey høvdu tikið seg úr kirkjuni í 1895 og vóru millum tey fyrstu, sum fylgdu gamla Sloan. Teirra vígsla var onnur borgarliga vígslan í Føroyum. Holm fúti gifti tey. Í vígsluprotokollini stendur: “Begge Parter udmeldt af Folkekirken og tilhører en Sekt kaldet “de kristne Brødres Menighed.”” Ludvig var fyrru ferð giftur við Onnu. Foreldur hennara vóru Anna Maria Hansdatter og Johannes Joensen úr Havn. Anna var fødd 17.9 1864. Tey giftust í Havnar Kirkju 27. november 1890. Hon doyði tó longu 14. mars 1892, bert 27 ára gomul.

Ludvig var ein kendur prædikumaður, eisini úti á bygd. Hann var eisini sunnudagsskúlalærari í Ebenezer. Ludvig var kendur fyri sítt hjartalag. Havi fingið at vita eini av einkjunum, tá ið Immanuel fórst við allari manningini í 1932, kom Ludvig inn til Søldarfjarðar, har hann lívgaði tey eftirsitandi.

## Byrjaði 9 ára gamal

Fyrsti føroyingur, sum fekk sær útbúgving sum blikksmiður, var pápi Ludvig, Johan C. Poulsen f. 1815, sum hevur teknað væl kenda býarkortið av Havnini frá 1867. 20 ára gamal fór hann til Keypmannahavnar at fara í læru. Eftir seks ára lærutíð fór hann til Týsklands, har hann var í eini sjey ár. Í 1848 kom hann aftur til Føryar, har hann fekk sær egnan verkstað, sum hann hevði inntil deyða sín 3. juli 1874. Tá var Ludvig bert 9 ára gamal, men hann var longu byrjaður at arbeiða undir vegleiðing av pápanum og beiggjanum Jens Christian, sum seinni gjørdist sakførari í Sorø og eisini riddari av Dannebrog.

Ludvig helt fram at arbeiða sjálvur, og ikki fyrr enn hann gjørdist 25 ár, fór hann til Danmarkar at fáa sær eina beinleiðis útbúgving. Tá ið hann kom aftur til Føroyar 3. Juni 1890 fekk hann sær egið virki sum blikksmiður. Á heysti 1900 fekk hann sær ein lítlan handil við køksútgerð. Tað gekk støðugt framá. Í 1902 var bert ein lærlingur, Morten Mortensen. Í 1917 vóru í verkstaðnum tveir sveinar og ein lærlingur, og í handlinum vóru tá tvey mannfólk og tvey konufólk. Í 1906 varð flutt oman í Tórsgøtu, har handilin framvegis er. Í 1935 vóru tey 9 starvsfólk, fýra sveinar og fimm fólk í forrætningini og skrivstovuni. Umsetningurin var eisini øktur samsvarandi. Verkstaðið fekst við alt, sum hoyrdi til fakið, her í millum at leggja vatn inn til fólk. Vatnleiðingur var lagdur í 1898, so her hevur verið nóg mikið at gera. Handilin gjørdist tann størsti í landinum av sínum slag, og hann hevði størstu goymslu í Føroyum av til dømis vatnrørum, kranum, lampum (bæði til petroleum og el), porselen, krystal og leikum. Eisini var longu tá útgerð til baðirúm. Handilin hevði einkarsølu av kendum vørum sum Nilfisk dustsúgvarum, Philips perum, PH lampum, svenskum primussum og annars av amboðum.



*Børnini hjá teimum báðum Sigrid, vanliga kallað Tulla, og Johan.*

Líkindini at dríva handil, serliga í krígsárunum vóru sera vánalig. Tað var ofta trupult at fáa fatur á tí tilfari, sum kravdist. Árini aftaná 1. heimsbardaga vóru eisini sera trupul, tá ið fiskaprísirinir fóru niður í einki. Tá fóru nógvir stórhandlar á húsagang. Ludvig Poulsen gav tó ikki skarvin yvir, og hann kom yvir kreppuna.

Tá ið Ludvig gjørdist eldri, fór handilin á aðrar hendur, og navnið broyttist frá Ludvig til Maria Poulsen. Í dag er tað ættin hjá Grími á Dul, sum eigur og rekur handilin.

## Ættin

Ludvig átti fýra systkin Wihelmina, Lina, Marianna og Johan Viderø. Johan er pápi Finn Viderø, sum eru kendur urguspælari í Danmark.

Ludvig og Maria fingu ikki færri enn 14 børn. Av teimum doyðu tey fýra sum smá. Um børnini kann stutt sigast:

Jákup giftist fyrst við írsku Eileen. Tey búðu í London og fingu Unu, sum vaks upp í Føroyum, men Una doyði bert 25 ára gomul. Eileen doyði, og hann giftist aftur við Molly, men tey fingu ikki børn.

Johan fór niður og giftist við norsku Ingeborg. Tey fingu Berit og Elsu.

Sigrid, kallað Tulle, giftist við Ísak Petersen, skómakara, og tey búðu í Havn. Tey fingu Miu, Dánjal (í Skóbúðini) og Onnu.

Ebbe fór 17 ára gamal til Canada og giftist við eini indianaragentu. Tey fingu eina dóttir.

William doyði 29 ára gamal í Havn.

Ingeborg giftist við Odmar Skarðhamar. Tey búðu nógv ár í Aberdeen, har Odmar var føroyskur umboðsmaður. Tey áttu Eyðfinn, Torfinn og Guðrið.

Torstein fór niður áðrenn kríggið og slapp ikki heim aftur, fyrr enn tað var liðugt, tá hann fekk sær egið virki. Hann fekk fyrst Finn við Turid Vang. Giftist so við Guri Poulsen. Tey fingu Eileen.

Esther giftist við Jacob við Reiðlið á Tvøroyri. Tey vóru barnleys.

Ruth doyr sum barn.

Herborg fekk dótrina Ednu, sum býr í Noregi, við Johan Hansen. Seinni giftist Herborg í Noregi við Bjarne Pettersen.

*Keldur:*
*Alisa Petersen, Óli Jákup Jacobsen, Fra Færøernes Næringsveje, Men Gud gav Vøkst.*



*Handilin lá sum nú í Tórsgøtu. Beint við niðan móti Niels Finsensgøtu vóru sethúsini. Millum var ein frálíka vakur urtagarður. Sethúsini gjørdust seinni partur av háhúsinum á Káta horninum.*

**Næstu ferð**

Næstu ferð umrøða vit Elsebeth Kristinu og Jóhan Simonsen í Hoyvík.

**Rætting til seinastu grein**

Elsebeth, sum giftist við Zakarias Poulsen, var systir Linu Danielsen.